Renning á norðoyastevnu

Áttanda árið á rað skipar Treysti fyri norðoyastevnurenning, og aftur í ár er vælumtókta firma-stafettin partur av hesi

RENNING
tíðindaskriv

Eins og undanfarin ár, so skipar Ítróttafelagið Treysti fyri tí árligu Føroya Bjór renningini á Norðoyastevnu. Hetta er áttandi árið á rað, at runnið verður í miðbýnum. Luttøkan hevur verið sera góð síðani tað byrjaði, og er hon voksin hvørt ár, og hava umleið 150 rennarir luttikið seinnu árini. Í ár verður renningin leygardagin 5. juni. Rutan hjá børnum verður tann sama, tvs. at runnið verður eftir Skúlavegi, Gerðagøtu og Biskupsstøðgøtu. Harafturímóti er rutan hjá teimum vaksnu broytt í ár, í mun til undanfarin ár. Í ár verður runnið runt »Stóra Eið«. Tvs. eftir Skúlavegi, Gerðagøtu, Heygavegi, Nýggjavegi, Bøgøtu og Biskupsstøðgøtu. Teinurin er tó óbroyttur. Rennast skulu 3 umfar av hesi rutu. Byrjað verður uppi í Bøgøtu við KÍ-høllina og runnið oman til Telefonstøðina. Tá komið verður fram við málinum fyrstu ferð, skal ein renna 3 umfør afturat. Byrjan hjá børnunum verður við Telefonstøðina.

Nógv verður lagt fyri, tá kappast verður á ymsu teinunum

Málið hjá øllum verður við Telefonstøðina. Kappingin hjá teimum vaksnu er samstundis 2. umfar í Grand Prix kappingini, meðan tað hjá børnunum er talan um 1. umfar í Grand Prix kappingini. Aftur í ár verður tað soleiðis, at ein skal verða limur í einum av teimum fýra felogunum fyri frælsan ítrótt, fyri at telja við í Grand Prix samanhangi. Skráin fyri rennikappingina sær annars soleiðis út:

Kl.	Aldursbólkur	Teinur
12.00	Menn/Kvinnur (f. 1986 ella fyrr)	5 km
12.00	Veteranar (f.1958 ella fyrr)	5 km
12.35	Dreingir-7/Gentur-7 (f.1997 ella seinni)	665 m
12.45	Dreingir-10/Gentur-10 (f.1994-1996)	665 m
12.55	Dreingir-13/Gentur-13 (f.1991-1993)	1.330 m
13.05	Dreingir-17/Gentur-17 (f.1987-1990)	1.330 m
13.15	Firma-staffet (3 luttakarir, 1 umfar í part)	665 m x 3
13.30	Heiðursmerkjahandan	

Grand Prix fyri børn

Aftur í summar verður skipað fyri Grand Prix kapping fyri børn. Kappingin hjá børnunum verður í ár í seks umførum. Fyrsta umfar verður á Norðoyastevnu, síðani eru tað Eystanstevna, Sundalagsstevna, Fjarðastevna, Vestanstevnu og at enda Ólavsøka, sum telja við. Kappingin er býtt upp í fýra aldursbólkar, sum eru hesir:

Dreingir-7 /Gentur-7	(f. 1997 ella seinni)
Dreingir-10/Gentur-10	(f. 1994-1996)
Dreingir-13/Gentur-13	(f. 1991-1993)
Dreingir-17/Gentur-17	(f. 1987-1990)

Stigatalvan sum verður brúkt hjá børnunum, verður tann sama sum hjá teimum vaksnu, tvs. at nr. 1. fær 40 stig og síðani fáa teir næstu rennarnir 34, 30, 26, 23, 20, 18, 16, 14, 12, 10, 9, 8, 7, 6, 5, 4, 3, 2 og nr. 20 fær 1 stig. Vinnarir í teimum ymsu bólkunum verða so teir rennarnir, sum hava fingið flest stig tilsamans á Ólavsøku og fáa nummar 1, 2 og 3 steyp til ognar. Fyri at telja við í endaligu stoðuni, so skal man hava verið við í minst 4 av teimum 6 kappingunum.

FÍF hevur í ár sett sum treyt, at fyri at kunna telja við í Grand Prix kappingini, so skal ein verða limur í einum av teimum fýra felogunum fyri frælsan ítrótt: Treysti úr Norðoyggjum, Bragdið úr Havn, Roysnið úr Eysturoynni ella Frælsi úr Vágunum.

Firma-stafettin

Aftur í ár verður skipa fyri «firma-staffet. Aftur í ár er tað soleiðis, at ongin »professionellir« rennari kann verða við, tvs. ongin sum hevur luttikið í 5 km frammanundan, kann verða við í staffettini. Henda broyting skuldi gjarna ført við sær, at tað blívur hugaligari hjá «amatørum« at verða við, og tað skuldi aftur ført við sær, at talið á liðum eisini øktist. Annars er alt tað sama. Tríggir luttakarir (menn/kvinnur) frá sama firma renna eitt umfar, sum er 665 m, í part. Fyrsti luttakari á liðnum byrjar og rennur eitt umfar, næsti luttakari stendur klárur á málinum og fær eitt klapp frá tí fyrsta og rennur síðani avstað, triðji og seinasti luttakari stendur klárur og fær eitt klapp frá tí næsta og rennur síðani avstað og tá hann kemur á mál er alt liðið komið á mál. Tvs. at 3. maður er avgerandi fyri hvussu liðið klárar seg. Best er um teir 3 luttakarnir frá sama firma hava líka blusir at renna í - so tað verður lættari at halda skil á skiftum. Virkir, stovnar o.l. kunnu tilmelda eitt ella fleiri lið á tríggjar rennarir.

Heiðursmerki og steyp

Heiðursmerki verða latin trimum teimum bestu hjá bæði gentum og dreingjum í øllum aldursbólkum, meðan tað hjá teimum vaksnu verður latið steyp til vinnaran hjá kvinnum og monnum og heiðursmerkir til nr. 2 og 3. Tríggir teir fyrstu veteranarnir fáa eisini heiðursmerki. Vinnandi stafett-liði fær steyp til ognar, umframt at nr. 1, 2 og 3 fáa heiðursmerkir. Okkurt leskiligt verður eisini at fáa frá høvuðsstuðlinum.

Tilmeldingar online

Aftur í ár verður tilmelding at fara fram online á heimasíðuni hjá FÍF, sum er www.athletics.fo. Freistin fyri onlinetilmelding er fríggjakvøldi 4. juni klokkan 18.00.

Eisini ber til, at tilmelda seg við Telefonstøðina, í seinasta lagi 1/2 tíma áðrenn renningarnar byrja, tá verður lagdar kr. 20 omaná vanliga startgjaldið. Allir luttakarir verða bidnir um, at møta við Telefonstøðina í góðari tíð áðrenn renningin byrjar.

Øll eru vælkomin at verða við, eisini tey sum ikki ætla at luttaka í Grand Prix, og vóna fyrireikarnir at undirtøkan verður minst líka góð sum hon hevur verið seinastu árini.

Fyrireikarnir úr Treystinum ynskja øllum eina góða Norðoyastevnu.

1. deild menn

		d	v - j - t	v mál	t mál	+/-	stig
1	Skála	5	4 - 1 - 0	13	4	9	13
2	HB	5	3 - 1 - 1	12	5	7	10
3	B36	5	2 - 2 - 1	10	5	5	8
4	VB	5	2 - 2 - 1	7	4	3	8
5	NSÍ	5	2 - 2 - 1	10	9	1	8
6	GÍ	5	2 - 1 - 2	7	9	-2	7
7	KÍ	5	1 - 3 - 1	7	8	-1	6
8	EB/ Streymur	5	1 - 2 - 2	5	9	-4	5
9	ÍF	5	1 - 0 - 4	10	14	-4	3
10	B68	5	0 - 0 - 5	3	17	-14	0

2. deild menn

		d	v - j - t	v mál	t mál	+/-	stig
1	TB	5	4 - 0 - 1	16	8	8	12
2	Royn	5	4 - 0 - 1	16	8	8	12
3	AB	5	3 - 1 - 1	10	7	3	10
4	FSV	5	3 - 0 - 2	18	9	9	9
5	Sumba	5	3 - 0 - 2	10	9	1	9
6	B71	5	3 - 0 - 2	12	15	-3	9
7	B36	5	2 - 0 - 3	8	13	-5	6
8	LÍF	5	1 - 1 - 3	7	12	-5	4
9	KÍ	5	0 - 1 - 4	8	14	-6	1
10	VB	5	0 - 1 - 4	5	15	-10	1

Máltindurin

adidas

1. deild

Heine Fernandez	HB	5
Bogi Gregersen	Skála	5
Rúni Elttør	ÍF	3
Áki Mørk	B36	2
Egil á Bø	B36	2
John Petersen	B36	2
Hallur Jacobsen	EB/S	2
Sonni L. Petersen	EB/S	2
Krzystof Popczynski	GÍ	2
Rógvi Jacobsen	HB	2
Magni á Lakjuni	ÍF	2
Atli Danielsen	KÍ	2
Erling Fles	KÍ	2
Stig Aksnes	KÍ	2
Gert Langgaard	NSÍ	2
Jónstein Petersen	NSÍ	2
Sjúrður Jacobsen	NSÍ	2
Jonhard Frederiksberg	Skála	2
Nenad Stankovic	Skála	2
Mindaugas	VB	2

HALDIÐ SOSIALIN

450,- um ársfjórðingin
- sparið **395,-** í mun til leysasølu

600,- kr. um ársfjórðingin í Danmark
(500,- kr. fyri 1 ferð um vikuna - 5 bløð)

Sosialurin

ARGJAVEGUR 26 · POSTSMOGA 76 · 110-TÓRSHAVN · TEL 341800 · FAX 341801
POST@SOSIALURIN.FO · WWW.SOSIALURIN.FO

Undirritaði teknar seg sum haldara av Sosialinum, og fær blaðið 5 ferðir um vikuna.

Navn: _____

Bústaður: _____

Postnr.: _____

Bygd/býur: _____

Telefon nr.: _____

Undirskrift: _____

Ókeypis
Verður sent ópostað Sosialurin rindar postgjaldið

64

Sosialurin
Postsmoga 76
110 Tórshavn

Sosialurin Sosialurin Sosialurin Sosialurin Sosialurin Sosialurin

Marknaðarfólk

STARV sosialurin

Ert tú fyrikomandi, dugir tú væl at selja, ert tú álítandi, røkin og dugur at arbeiða sjálvstøðugt, so ert tú júst tann persónurin, sum vit leita eftir.

Til marknaðardeild okkara søkja vit eftir starvsfólki, sum kann vera viðvirkandi til framhaldandi at menna inntøkugrundarlag okkara, og sum í ávísan mun eisini kann átaka sær leiðsluupp-gávur.

Lýsingarinntøkur eru ein týðandi partur av tilverugrundarlagnum hjá føroysku bløðunum, og ti leita vit støðugt eftir nýggjum hættum at menna hendan partin av fyritøkuni. Tí er tørvur á fólkum, sum duga at fáa og ikki minst arbeiða víðari við góðum hugskotum. Kundarøkt, account-management og telemarketing eru eisini arbeiðsuppgávur, sum vit framyvir koma at leggja enn størri dent á, og kemur starvið eisini partvíst at fevna um hesi øki.

Í samstarvi við starvsfelagarnar á marknaðardeildini verður tú eisini við í dagligu framleiðsluni av blaðnum. Herundir tilrættislegging av lýsingarátøkum, temabløðum og lýsingartilboðum.

Løn verður ásett sambært avtalu.

Ljóðar hetta sum nakað fyri teg, so er bert at senda eina umsókn við frágreiðing um útbúgving og royndir til okkum. Ynskir tú at fáa meira at vita um starvið, ert tú vælkomin at seta teg í samband við Jonhard Hammer, marknaðarleiðara, á tlf. 341800. Tað ber sjálvandi eisini til at senda teldupost á jonhard@sosialurin.fo

Umsóknarfreistin er 11. juni, og skal umsóknin saman við viðkomandi skjølum sendast til:

Sosialurin
Marknaðardeildin
Postsmoga 76
110 Tórshavn

Vit eru alla tíðina úti um okkum, og fimm ferðir um vikuna koma vit á gøtuna við einum nýggjum og feskum blað. Umframt tað verður blaðið hvønn dag lagt á internetið. Á Sosialinum starvast í dag uml. 25 fólk.